## Stríð um kóp

Um einar fjúrtan dagar fer ES-tingið at viðgera eitt uppskot um, at samveldið skal banna øllum handli við kópaskinnum. Verður uppskotið samtykt, fer tað millum annað at bera í sær, at ES gevst at innflyta kópaskinn. Uppskotið hevur vakt stóran ans í Grønlandi. Aleqa Hammond, landsstýriskvinna í uttanríkispolitiskum viðurskiftum, sigur við KNR, at tað fær sera álvarssamar avleiðingar í Grønlandi, verður uppskotið samtykt.



*Aleqa Hammond fer í stríð fyri kópaskinnini*
*(Mynd: KNR)*

## Illir grønlendingar

Í grønlendska fiski- og veiðimannafelagnum KNAPK eru tey í øðini um, at ES-londini í altjóða hvalaveiðinevndini IWC settu seg upp ímóti einum uppskoti um at loyva grønlendingum at veiða 10 kúlubøkur. Fleiri í felagnum vilja hava landsstýrið at senda mannarættindadómstólinum hjá ES eina kæru um avgerðina, og at fiskivinnuavtalan við ES skal endurskoðast. ES-londini eru júst nóg mong í tali til at forða einum uppskoti, sigur KNR.

# Thor Omega av bakkastokki

**Leygarmorgunin var hátíðarløta á Skála, tá seinni nýbygningurin hjá Thor í Hósvík fór av bakkastokki**



*Í silvitni og bakandi sól stevnir Thor Omega so hábærsligur oman úr hurðagapinum og út á hav*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

NÝBYGNINGUR

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Væl av fólki var samankomið í góðveðrinum á Skála leygarmorgunin til móttøku. Seinni nýbygningurin hjá Thor í Hósvík skuldi av bakkastokki, og fólk vóru forvitin eftir at síggja og fylgja hesi hending.

Áðrenn skipið varð loyst í byggihøllini og kundi stevna út á sjógv, søgdu Mourits Mohr, rakstrarleiðari og Thormund Johannesen, verkætlanarleiðari á Skála Skipasmiðju, nøkur orð.

Skipasmiðjukórið setti eisini sín dám á hesa fyrstu løtuna av hátíðarhaldinum.

### Dýrd á vík…

Alt gekk skjótt og væl fyri seg.

Tá løtan kom, setti nýbygningurin stevnið oman úr hurðagapinum og fór so hábærsligur omaneftir bedingini og út á sjógv.

Nakrir bátar lógu eisini út fyri Skála Skipasmiðju og fylgdu løtuni í silvitni og bakandi morgunsól.

Eftir at skipið hevði ligið eina løtu úti á vánni, varð endi settur á, og nýbygningurin varð sleipaður aftur til bryggju.

Eftir sjóseting bjóðaði Skála Skipasmiðja til pinnamat og okkurt leskandi, samstundis sum Skipasmiðjukórið aftur setti sín dám á við sanginum »Dýrd á vík og vág…«

### Alpha og Omega

Hóast hetta seinna skipið hjá Thor í Hósvík enn ikki er navngivið, krógvast navnið ikki, sum er sveisað á skipssíðuna.

Thor Omega verður navnið, og tað er kanska ikki so undrunarvert, tá fyrri nýbygningurin, sum varð navngivin og latin eigarunum tíðliga í hesum árinum, fekk navnið Thor Alpha.

Thor Alpha og Thor Omega eru systirskip. Hetta eru nýbygningar nummar ávikavist 56 og 57 á Skála Skipasmiðju.

Hetta eru veitingarskip til oljuvinnuna. Tey eru 55 metrar long og 13 metrar breið.

Um ein lítlan mánaða fer Thor Omega niður til Assens í Danmark, har skipið verður sandblást, metalliserað og málað, og sambært sáttmálanum verður nýbygningurin latin eigarunum 14. september í ár.



*Thor-brøðurnir, Gunnbjørn og Hans Andrias og Gunnar Mohr, fyrrverandi skipasmiðjustjóri. Kvinnan á myndini er kona Hans Andrias, Súsanna*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Sancy í seismikkvinnu í Grønlandi

**Helgi Davidsen, sum er ættaður úr Runavík, fer at føra Sancy, ið hugsandi verður »chasari« í seismikkvinnuni í Grønlandi**

SANCY

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Djúpvatnstrolarin Sancy, sum hevur verið ein partur av føroyska fiskiskipaflotanum seinastu árini, er nú seldur til Noregs, har hann fer at sigla sum fylgiskip í seismikkvinnuni. Keypari er norðmaðurin Oddvar Vea, sum áður hevur keypt Froyu I og eitt nú chartrar Jónrit, sum er heimahoyrandi á Strondum.

Í nakrar dagar hevur Sancy ligið í Runavík, har maskinverkstaðurin Mekanik er í holt við at yvirhála høvuðsmotor og ljósmotor. Hetta eru krøv, sum klassin setir.

Helgi Davidsen, sum er ættaður úr Runavík, skal føra skipið, tá tað loysir aftur. Saman við honum verða fýra aðrir føroyingar, stýrimaður, tveir maskinmenn og kokkur.

Enn er ikki endaliga gjørt av, um skipið fer at sigla undir føroyskum ella norskum flaggi.

Helgi, sum í eini 10 ár hevur búð í Danmark, hevur siglt hjá Oddvar Vea í umleið hálvt annað ár, og hann hevur eisini ført Froyu I.

Skiparin sigur, at tað er ikki óhugsandi, at Sancy verður tað, sum rópt verður, »chasari« í seismikkvinnuni í Grønlandi.

Nakrir mans, sum fara at sigla við Sancy, eru nú í holt við at snøgga um skipið, og fyrsta dagin koma málarar umborð.

Helgi Davidsen sigur, at Sancy hevur verið uppi á bedingini hjá Tórshavnar Skipasmiðju, og hann vónar, at klárt verður at loysa um fáar vikur.

Sancy er farin úr føroyska fiskiskipaflotanum fyri Beinisvørð hjá Sancy Trawl, sum er keyptur úr Íslandi, og nú verður gamli djúpvatnstrolarin riggaður til oljuvinnu, samstundis sum Beinisvørð verður riggaður til fiskiskap.



*Fimm av seks monnum við Sancy verða føroyingar*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*